


**Nr. 15** **27. juli 2014** **74. árg.**

# Vit eru Guds ogn

*Tí at frá honum og við honum og til hansara eru allir lutir.*
*Róm. 11,36.*

Menn vóru í ferð við at umvæla eina gamla altartalvu. Okkurt heilt annað var vorðið málað út yvir upprunaligu myndina og bíbliutekstin. Men tá ið teir høvdu fingið flust alt tað seinna uttanav, stóðu bíbliuorðini her omanfyri eftir. Hetta var upprunaliga innskriftin á altartalvuni. Um vit kundu flust øll løgini uttan av okkara egnu sál, alt, sum hevði lagt seg yvir hugsanir okkara, so at alt var vorðið avskeplað … so høvdu vit sæð, at vit eru Guds – frá honum og við honum og til hansara.

Ikki megna vit at loysa allar heimsgáturnar, og ikki fáa vit brotið okkum ígjøgnum djúpu loyndarmálini í tilveruni, vit sleppa ikki aftur um alt - vit eru ikki Gud.

Í frásøgnini um syndafallið sigur freistarin við Ádam og Evu: Tit munnu fara at gerast líka so klók sum Gud. Um menniskju vilja gerast tað, missa tey seg sjálvan burtur í gátuni um hitt illa, til alt at enda gerst tómt og myrkt. Menniskjað blæsir seg upp og er um at bresta av ”klókskapi.” Men vísdómurin byrjar við tí einføldu, greiðu sannføringini: Tú ert ikki Gud! Hetta er ein ásannan, sum ger okkum frí. Og síðani fer Gud við Heilaga Anda sínum at leiða okkum til eina enn betri sannføring: Vit eru Guds ogn!

Hvussu lívið so enn háttar sær, so eru vit trygg og kunna við treysti líta frameftir, um vit hava litið okkum upp í hendur hins altvaldandi.

*Mær, Harri, unni*
*at tæna eina tær*
*við sál og munni,*
*sum orð títt loyvir mær;*
*um verðin rívur*
*mítt hold sum nota stinn,*
*um sjúka nívir,*
*so gev mær tol í sinn'!*
*Inntil tað lívir,*
*har, tú meg leiðir inn.*

*Har skal eg vera*
*hjá tær um alla tíð*
*og krúnu bera*
*sum halgifjøldin blíð;*
*tí vil eg bjóða*
*tær lív mítt alt í verð,*
*so tað man ljóða,*
*tá skilnarstund tað er:*
*„Far heim, hin góði,*
*við mær á himnaferð!“*

# Harrin er hin sami

*Alt at ellisárum eri eg hin sami; eg beri tykkum, til hárini á tykkum grána; eg lyfti og fari undir tykkum, eg beri og bjargi tykkum.*

*Jes. 46,4.*

Alt at ellisárum, soleiðis stendur skrivað. Hetta er Guds undursama lyfti til bæði ung og gomul. Hvønn dag nærkast vit grøvini. Vegurin aftan fyri okkum gerst alsamt longri – og tað, sum eftir er av vegnum, styttri. Vit broytast og vita tað ikki. Árini seta dám á okkum, sum ongantíð verða fingin burtur.

Men Harrin er hin sami, hin óbroytiligi, trúfasti Gud og Faðir. Ongantíð møðist hann av okkum. Ongantíð vil hann koyra okkum burtur frá sær. Kærleiki hansara er líka eymur, umsorgan hansara líka óbroytilig og trúføst. Gud er hin sami í dag, sum tá ið eg var barn.

Til hárini á tykkum grána, sigur hann. Eg lyfti og fari undir tykkum. Eg beri og bjargi tykkum. Og havi gjørt tað og fari altíð at gera tað.

*t.* týddi.

# Sum svøvnurin

Seinastu orðini hjá norðuramerikanska prestinum John Eliot, nevndur ápostul indianaranna, vóru: ”Deyðin verður fyri meg, sum svøvnurin fyri tey móðu. Harrin, sum eg í fýrsinstjúgu ár havi tænt, fer ikki frá mær. O, kom í tíni dýrd! Leingi havi eg bíðað eftir tær. Vælkomin, Harri, vælkomin!”

# Himmalin, heim títt

*"... eg skal búgva í húsi Harrans allar ævir." Sálm. 23,6 V.D.*

Meðan tú ert ung, tykist himmalin ikki serliga hugtakandi. Vit hava so mangar dreymar um kærleika, hjúnalag, børn, starv og so víðari. Men vit eldast, og á tann hátt fær Gud okkum at leingjast heim til sín. Og hvat við deyðanum? Tey kristnu verða ikki jarðað, tey verða sáað. Paulus skrivar, at "soleiðis er tað eisini við uppreisn teirra deyðu. Likam okkara verður lagt í moldina sum eitt sáðkorn. Tað verður sáað forgongiligt, men rísur upp óforgongiligt." 1. Kor. 15,42-43 D.B. Calvin Miller skrivar: "Verðin er fátæk, tí at skattir hennara eru í Himli, men allar hennara skattarokningar eru her á jørð."

Hevur tú hoyrt søguna um fuglin, Putsy? Av tí at eingin segði seg at eiga hann, gav Sosiala deild Sue hann. Tey gjørdust skjótt vinir. Ein dagin gjørdi tann lítli fuglurin okkurt heilt óvanligt. Hann pikkaði á øksl hennara og segði: "1500 South Oneida Street, Green Bay, Wisconsin." Sue stóð sum Kánus. Hon fekk greiði á, at adressan veruliga var til, og hon fór yvir hagar. Har møtti hon einum manni, sum æt John Stoobants.

"Eiga tygum ein parakit?" spurdi hon. "Eg átti ein. Mær leingist so ógvuliga illa eftir honum," svaraði hann. Hann gjørdist so hjartans fegin, tá ið hann sá Putsy. "Veitst tú hvat, hann kennir enntá sítt telefonnummar."

Henda søgan er ikki so ør, sum tú kanska heldur. Skilir tú, vit hava øll ævinleikans adressu lagda niður í okkum: "... hann hevur plantað ævinleikan í hjarta menniskjans." Præd. 3,11. D.B. Innast inni vita vit væl, at vit ikki eru heima enn, so vit mugu ansa væl eftir ikki at liva, sum eru vit tað. Hevði tú bygt tær eitt heim á einum hotelli? Tað versta er ikki at kenna seg langt heimanifrá, tá ið tú ert tað. Nei, hitt versta er at kenna seg rættiliga væl heima, tá ið tú ikki ert komin heim enn. Og vit eru ikki heima enn, tí "... at borgaraskapur okkara er á Himnum hjá Frelsara okkara, Jesusi Kristusi." Fil. 3,20.

"… et Ord til Dagen"
*Effie Campbell* umsetti.

# Faðirvár

Á møtinum í gjár lurtaði eg eftir einum vitnisburði, sum gjørdi henda setningin livandi fyri meg: “Tað minsta, sum hevur týdning, hevur størri virði enn tað, sum er uttan týdning!”

Ein sjúkrasystir, sum eg her vil kalla Maria, segði frá arbeiðsplássi sínum, har tað er sett forboð fyri at vitna um Jesus. Ein dóttir hevði ringt og biðið Mariu hugt til mammu sína, sum var ógvuliga bangin. Tá ið Maria kom inn til mammu hennara, var tann gamla konan sum runnin í stein av ótta. Harrin legði Mariu á hjartað at spyrja: “Plagar tú at biðja Faðirvár?”

Konan nikkaði. So spurdi Maria, um tær skuldu biðja Faðirvár saman. Konan nikkaði aftur. So bóðu tær Faðirvár, og andlitið í gomlu konuni broyttist fullkomiliga. Hon lýsti av gleði. Maria lovaði, at tá ið hon var á vakt, skuldi hon biðja Faðirvár við henni hvørt kvøld.

Maria skrivaði alla hesa hendingina niður í sjúkrajournalina, sum øll starvsfólkini lesa. Síðani fór hon at tosa við yvirsjúkrasystrina um hesa hending. Yvirsjúkrasystirin spurdi Mariu: “Heldur tú veruliga, at tað hevur so stóran týdning fyri eitt menniskja, at onkur hjálpir tí at biðja Faðirvár?” - “Ja,” svaraði Maria.

Endin var tann, at tær skrivaðu bønina Faðirvár niður og løgdu hana á borðið hjá tí gomlu konuni. Hvørt einasta starvsfólk, sum hevur vakt, hevur fingið boð um at biðja Faðirvár saman við hesari gomlu konuni.

Sært tú nú, at hitt minsta við týdningi hevur stórt virði? Maria er hin minsta - ein lítil sjúkrasystir, sum ikki fær loyvi at vitna um tann Jesus, sum hon trýr uppá. Men hon finnur ein veg, sum ber stóran týdning í sær og spyr um bønina Faðirvár - og nú biðja allir starvsfelagirnir Faðirvár á tí stovuni til gleði fyri ta gomlu konuna.

Tað er bara Gud, sum veit, hvat ið Faðirvár kann koma at týða fyri onkran av starvsfeløgunum, sum bara biður Faðirvár, tí tað er hennara skylda, tað er ein partur av arbeiðinum. Faðirvár er Guds Orð - og Orðið kann tala til eina sjúkrasystur og kalla hana til umvendingar.

*Effie Campbell* umsetti.

---

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74




*Nr. 16* **10. august 2014** **74. árg.**

# Vit eru biddarar

*Sæl eru tey í andanum fátæku, tí at himmiríkið er teirra. Matt. 5,3.*

Tá ið Martin Luther var deyður, funnu tey á borði hansara hesi orð skrivað á ein lepa: „Vit eru biddarar, tað er satt.“ Tað var lívsroyndin hjá hesum stórmenni, at hann bara kundi møta Gudi við tómum hondum. Men hann hevði eisini sannað, at tá ið hann onki var í sær sjálvum, kundi Gud geva honum alt, sum honum tørvaði til lívið og sæluna.

Hetta er sannleikin um okkum menniskju, at vit onki hava í okkum sjálvum, sum vit kunnu koma fram við, og sum kann gera, at vit hava uppiborið Guds góðtokka.

Men tað er eisini satt, at Gud er so ríkur og stórur, at hann bæði kann og vil geva biddaranum náðinnar ríkidømi sítt. Tað hevur hann sagt okkum í Harra okkara Jesusi Kristi, sum gjørdist fátækur, tá ið hann var ríkur, fyri at vit við fátækt hansara skuldu gerast rík.

Tí verða tey í andanum fátæku prísað sæl, tí at himmiríkið er teirra.

Tí peikaði Jesus á barnið, tá ið hann varð spurdur um, hvør ið var størstur í Guds ríki. Barnið, sum er fullkomiliga hjálparleyst og má fáa alt givið.

Tí kemur boðskapurin um Guds óuppibornu náði heldur ongastaðni klárari fram enn við doypifuntin, tá ið vit bera okkara smáu og hjálparleysu fram fyri hann, og hann tekur ímóti teimum.

Latið okkum tí við treysti stíga fram fyri hann sum teir biddarar, vit eru. Í Sálmi 102 stendur ”Hann vendir sær at bøn teirra ørmu og vrakar ei teirra bøn.”

*Eg fátækur og veikur eri,*
*o, náðiríki Jesus, kom,*
*í sálardýpið tú mær beri*
*títt náðar evangelium,*
*at eg tað má í barmi bera*
*og tí um ævir sælur vera!*

# Hvaðani kemur hjálpin?

*Eg eygu míni hevji til fjallanna upp, hvaðani kemur mín hjálp?*
*Hjálp mín frá Harranum kemur, skapara himmals og jarðar.*

*Sálmur 121,1-2.*

Ein maður stendur ráðaleysur og hevjar eygu síni til fjallanna upp. Hvaðani skal hjálp mín koma? Tá tala fjøllini sítt stilla, kraftmikla mál. Tey siga orð um skapara sín. Tey vøkru, máttmiklu fjøllini eru ikki vorðin til av sær sjálvum. Hin almáttugi Gud hevur við skapanarorði sínum skapað alt.

Og hesin Gud livir enn! Líka vist sum fjøllini standa, livir Gud. Orð hansara eru sterkari og fastari enn nakað berg. Lyfti hansara eru tryggari enn jarðarinnar djúpgrund. Og hann, sum heldur jørðini við sínum veldigu bergum í síni skaparhond, hevur eisini mátt at hjálpa og bera eitt neyðars, lítið mannabarn.

Og maðurin, sum hevjar eyguni til fjallanna upp, verður troystaður og glaður. Nú veit hann, hvaðan hjálpin skal koma. Hin mikli máttur Guds hevur onki mark, og trúfesti hansara er tryggari enn nakað berg og fjall, og hann hevur lovað at hjálpa.

Hjálp mín frá Harranum kemur, skapara himmals og jarðar. Hevja eygu tíni til fjallanna upp og lít á Gud!

*t.* týddi.

---

Øll Guds ætlan er um okkum menniskju, sum eru skapað í hansara mynd. Øll ætlanin við skapanarverkinum var at luta kærleikan við okkum menniskju. Tað er Guds ætlan, at øll skulu finna sannleikan og liva um ævir við Jesusi í himli, har eingin sorg ella sjúka ræður, har allur óndskapur er burtur, har allar líðingar fara at verða gloymdar, og alt verður endurnýggjað.

*e.c.* ums.

# Úr einum himmalskum sjónarhorni

*”... mikil er løn tykkara í himli...” Luk. 6,23.*

Les hesi trý skriftstøðini gjølla: ”Tí at menniskjusonurin skal koma í faðirs síns dýrd við einglum sínum, og tá skal hann gjalda einum  og hvørjum eftir virki hansara.” Matt. 16,27 – ”… tú skalt eiga dýran grip í himli…” Matt. 19,27 – ”… men tað (lønin) skal verða tær afturgoldið, tá ið hini rættvísu rísa upp.” Luk. 14,14.

Gud fylgir við tí, sum tú hvønn dag gert fyri hann. Tú kanst fáa meir burturúr at tæna Harranum, enn tú nakrantíð kanst ímynda tær. Ja, hann signar og lønir tær í hesum lívinum; men tað kann als ikki sammetast við tað, sum bíðar tær í tí næsta lívinum. Tá ið tú veitst tað, verða vanligar avgerðir um, hvussu tú brúkar tíð, pengar og orku, brádliga møguleikar, sum rúma veldig lyfti.

Hevur tú fyrst skilt tað, fert tú at liva við einari óvikandi vissu um, at alt, sum tú gert í dag – hevur ævigan týdning. Og tann sannleikin kann veruliga gera lív títt betri! Jesus segði: ”Sælir eru tit, tá ið menn hata tykkum, og tá ið teir koyra tykkum út (frysta tykkum út) og háða tykkum og vanvirða navn tykkara sum eitt, ið ilt er, fyri menniskjusonarins skuld. Fegnist á tí degi og leypið av gleði, tí sí, mikil er løn tykkara í himli…” Luk. 6,22-23.

Jesus meinti ikki, at tú fórt at verða so glaður, at tú fekst hug at dansa írskan fólkadans, tá ið tú verður illa viðfarin fyri hansara skuld. Nei, hann segði: ”… mikil er løn tykkara í himli…” Luk. 6,23. Hesi seks orðini vísa tær, hví tú kanst gleðast. Sjálvt undir verstu umstøðum. Tað er eitt beinleiðis samband millum tað, tú gert fyri Gud á jørðini, og nakað ”stórt”, hann vil gera fyri teg í himli. Jesus biður teg ikki njóta vesaldómin vegna títt samband við hann. Hann sigur, at tann løn, sum bíðar tær í himli fyri ávísar gerðir á jørðini, fer at verða so undurfull, at tann bera vissan um, at hon kemur, fer at broyta tað lívið, tú livir nú. Tað átti veruliga at elvt til nøkur fagnaðarróp!

”… et Ord til Dagen”<br>*Effie Campbell* umsetti.

# Land, land, hoyr orð Harrans!

Hatta var boðskapurin hjá Jeremia til Ísraels fyri 2600 árum síðani. (Jer. 22,29) Men boðskapurin er hin sami í dag til Føroyar. Tey føroysku virðini spretta úr Guds orði. Ein studentaskúlalærari sigur soleiðis: ”Tá ið eg biði mínar næmingar tulka ein tekst, sigi eg við teir: Hvat sigur teksturin? Tykkara egna meining hevur ongan týdning.” Trúvirði Bíbliunnar er langt síðani staðfest. Tí kunnu vit eisini nú og í framtíðini rokna við Orðsins teksti. Okkara egnu meiningar og tulkingar fara at vísa seg at falla til jarðar.

Ymiskar tsunamiir, íroknað fíggjarligar tsunamiir, leika óðar í verðini í dag. Orðið kallar hesar ristingar fyri tekin, fráboðanir og føðingarverkir. Hesar ristingar fara ikki at minka – men økjast í allar mátar – eisini í Evropa – og eisini í Føroyum.

Tí kunnu vit ikki nóg dyggiliga strika undir hetta orðið: Land, land, hoyr orð Harrans – eisini í dag og í framtíðini. Vit mugu venda um frá treiskni, eginvild og vantrúgv – og staðin fyri venda okkum til fedranna Gud og son hansara Jesus Kristus. Hetta er einasta vónin hjá Føroyum at standast í komandi ristingum og kreppum, sum koma í hæddina, tá ið Jesus kemur aftur.

*Effie Campbell* umsetti.

## *Ein smoga*

Bilsin gjørdist læknavísindin, at skemtarin Fields livdi, til hann gjørdist 67 ára gamal. Sambært tíðindabløðunum doyði hann av drykkjuskapi.

Á sjúkrahúsinum, har hann var innlagdur, kom ein av hansara fáu vinum at vitja hann. Hann gjørdist bilsin, tá ið hann sá, at hin deyðsjúki skemtarin lá og las í Bíbliuni.

”Hvat er tað, tú gert, skyldmaðurin?”

”Eg leiti mær eftir einari smogu!” svaraði Fields.”

---

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74